**Mentamálaráðið**
MENTAMÁLADEILDIN

## STUÐUL TIL YRKISLEIKLIST

**Møguleiki er at søkja um stuðul til yrkisleiklist**

Umsóknarblað og vegleiðing kunnu heintast á heimasíðu Mentamálaráðsins: www.mmr.fo undir „Mentan“ – „Oyðubløð“, ella við at venda sær til Mentamálaráðið.

Freistin at søkja um stuðul er 2. januar 2008.

Viðvíkjandi treytum og møguleikum fyri stuðli verður víst til løgtingslóg nr. 68 frá 2. mai 2003 um Tjóðpall Føroya og stuðul til leiklist v.m., og kunngerð nr. 18 frá 19. apríl 2004 um stuðul til leiklist v.m.

**Umsóknir skulu stílast:**
Mentamálaráðið
Postrúm 3279
110 Tórshavn

sansir.fo

**Mentamálaráðið** hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harumframt fyrisitur ráðið uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.

# Sálarfrøðingur

*Ert tú okkara nýggi starvsfelagi á Føroya Barnaheimi?*

Sálarfrøðingur cand. psych ella cand. pæd. psych søkist til Føroya Barnaheim at starvast 20 tímar um vikuna. Starvið er leyst til setan frá 01.03.2008 ella skjótast til ber.

Barnaheimið er býtt sundur í tvær deildir, ið fevna um eina Ungdómsdeild og eina Familjudeild. Tú verður knýtt/ur afturat virkseminum á báðum deildunum.

- Endamálið við arbeiðinum á Ungdómsdeildini er at geva umsorgan og vegleiðing við støði í tí einstaka barninum, samstundis sum reglusemið verður fingið til vega í gerandisdegnum.

- Endamálið við arbeiðinum á Familjudeildini er m.a. við eygleiðing, stuðli og vegleiðing, at fáa greiðu á, hvørjar styrkir og trupulleikar familjan hevur, og meta um, hvat slag av stuðli er mest viðkomandi at veita familjuni framyvir.

**Søkt verður eftir einum starvsfelaga, sum:**
- er góðkendur sálarfrøðingur ella er í ferð við at gerast liðugur.
- kann gera sálarfrøðiligar kanningar av børnum, ungum og foreldrum.
- helst hevur royndir við ungdóms- og familjuarbeiði.
- vil vera við til áhaldandi at menna arbeiðshættirnar á deildunum.
- kann vera við til at leggja virkisætlanir til rættis fyri familjurnar og tey ungu.
- kann arbeiða sjálvstøðugt við støði í sínum egna yrkiskunnleika og í tøttum samstarvi við onnur.

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt avbjóðandi starv saman við einum virkisfúsum og tvørfakligum starvsfólkabólki í einum viðurkennandi og óhátíðarligum umhvørvi.
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur í einum umhvørvi í støðugari menning.
- uttanhýsis ráðgeving.
- løn- og setanarviðurskifti sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Magistarafelag Føroya.

**Umsóknarfreist:**
Umsókn við prógvum og øðrum viðkomandi skjølum skal vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 07.01.2008

Føroya Barnaheim,
Pedda við Steingøta 10
FO-100 Tórshavn

Meira kann fáast at vita um starvið við at venda tær til Beintu Johannesen Mørkøre, leiðara, á tlf. 312320.

**Føroya Barnaheim**
Pedda við Steingøta 10
FO-100 Tórshavn

Røktar- og umlættingarheimið
*Lágargarður*

## Starvsfólk til dagstovnin á Lágargarði

Lýst verður eftir fólki til dagstovnin á Lágargarði við serligum áhuga og hegni innan handaverk, og við førleika innan aktivering.

Talan er um eitt farloyvisstarv frá 15. januar 2008, ella eftir nærri avtalu, til 31. desember 2008.

Arbeiðstíðin er 40 t/vikuna.

Starvið er lønt sambært avtalu millum Fíggjarmálastýrið og avvarandi yrkisfelag.

Á dagstovninum eru 36 heimabúgvandi pensionistar um vikuna saman við búfólkunum, ið eru 48 í tali, sum fáa tilboð um bæði ítriv og venjing.

Væntað verður, at umsøkjarir hava góð samstarvsevnir og kunnu arbeiða sjálvstøðugt.

Meira fæst at vita um starvið við at ringja til Jórun Simonsen, leiðara á dagstovninum, á tlf. 31 67 88.

Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvi og tilmæli skal sendast til :

**Lágargarð**
**Att. Meta av Fløtum,leiðari**
**Stoffalág 84**
**Postboks 1188**
**FO-110 Tórshavn**

**Umsóknarfreist: 28. des. 2007**

# Frá Føroya Fiskimannafelag

**Aðalfundur verður 28 desember í Norðurlandahúsinum kl. 10**

**Fundarskrá**
1. Val av fundarstjóra
2. Formansfrágreiðing
3. Val av grannskoðara
4. Uppskot frá stjórn og sóknum
5. Ymiskt
6. Uppskot um, og ásetan av limagjaldi
7. Uppskot um bygnaðarbroytingar í Føroya Fiskimannafelag
8. Trivnaður og trygd hjá fiskimonnum
9. Taka saman um, og hugskot um framtíðina

Føroya Fiskimannafelag

Lesið Sosialin - so eru tit við